# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Sigrid B. Joensen, Tórshavn:

## 40 ár á Tjaldurs Apoteki

Týsdagin 17. januar 2006 hevði Sigrid B. Joensen í Havn 40 ára starvsdag á Tjaldurs Apoteki í Havn.

Sigrid byrjaði á gamla Apotekinum í miðbýnum í 1966, tá hon fór í læru sum defektrisa, og í 1992 tók hon útbúgving sum farmakonomur. Hon sigur, at Apotekið er eitt sera gott arbeiðspláss, og hon trívist væl millum tey umleið 60 starvsfólkini á Trapputrøðni.

Sigrid er ættað úr Klaksvík, dóttir Rakul, f. Hansen, úr Fuglafirði, og Óla Hans Biskupstøð úr Klaksvík. Hon er gift Napolen Joensen, og tey eiga tvær døtur: Rigmor, sum býr í Norra, og Rakul, sum býr í Danmark. Barnabørnini eru 3 í tali.




*Týsdagin 17. januar 2006 hevði Sigrid B. Joensen 40 ára starvsdag á Tjaldurs Apoteki í Havn*

## Andlát og jarðarferðir

**Ruth Apol úr Havn** andaðist á Landssjúkrahúsinum sunnudagin 22. januar 78 ára gomul. Kistan úr fer Landssjúkrahúskapellinum mikukvøldið kl. 18. Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjunikirkjuni hósdagin 26. januar kl. 13.00.

**Richard Thomsen úr Havn**, ættaður úr Sumba, andaðist leygardagin 21. januar á Landssjúkrahúsinum, 73 ára gamal. Kistan fer úr Landssjúkrahúskapellinum týsdagin 24. januar kl. 18. Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni mikudagin 25. januar kl. 13. Sungið verður úr Sálmabókini.

**Regin Hansen, Nykøbeng Falster**, ættaður av Kjalnesi í Kollafirði, andaðist sunnudagin 22. januar, 71 ára gamal.

**Johanna Horn** andaðist sunnudagin 22. januar í Skagen, 98 ára gomul. Jarðarferðin verður lýst seinni.

# Nógv rusk at heinta

**– Hetta var eitt sindur býtt í morgun. Nú fóru luftfjarðarnar á bilinum, so her gerst ikki meiri í dag, sigur Martin Djurhuus, rusksavnari í Skálavík**

**RUSKSAVNARI**
*Snorri Brend*

**Norðskáli:** Týsdagin var Martin Djurhuus á veg til Leirvíkar við nærum fullum bili av ruski.

Ávegis til brennistøðina steðgaði hann sum vanligt á við handilin Inn á Norðskála.

Her skuldi hann tøma eina bingju fyri pappeskjur, og síðani skuldi hann til eitt stað aftrat - Shell-støðina á Oyrarbakka - áðrenn kósin varð sett móti Leirvík.

Men henda morgunin hendi tað sera óhepna, at luftfjarðarnar fóru aftanfyri á bilinum. Og tí fekk hann ikki tikið meiri rusk henda dagin.

– Eg fari nú at tosa við verkstaðið, og so finna vit út av, hvat vit kunnu gera. Kanska fer hann á verkstað seinni í dag. Hetta var ikki so gott, sigur Martin eitt sindur harmur á málinum.

Bilurin hjá Martini kann taka um 50 kubikkmetrar av ruski. Og hann er nærum fulllastaður hvønn einasta dag.




*Martin Djurhuus hevur verið við IRF, síðani tað byrjaði. – Hetta er eitt gott arbeiði, sigur hann*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

### Gott arbeiði

Martin hevur verið rusksavnari líka síðani IRF byrjaði.

Hann koyrir eftir fastari skipan, og savnar rusk inn bæði á Sandoynni og aðrastaðni kring landið.

Mánadag savnar hann rusk saman í Húsavík, Dali, Skálavík og í Skopun, meðan hann mikudag savnar ruskið saman á Sandi, umframt tað at hann tømir bingjur.

Týsdag og hósdag fer hann so norður um Skopunarfjørð við ruskinum, men hevur so eisini fastar rutur í Eysturoynni, nú hann er á meginøkinum.

Fríggjadagurin fer sum oftast til reingerð og viðlíkahald av ruskbilinum.

Martini dámar væl hetta arbeiðið sum rusksavnari. Ella sum hann sigur tað:

– Hetta er eitt gott arbeiði. Men eg veit ikki, um tað er so spesielt. Tað er helst sum so nógv onnur arbeiði.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, ið sýndu samkenslu, tá okkara elskaði pápi, verfaðir, abbi og langabbi

**Óli Johann Samuelsen**

andaðist og varð borin til hvíldar.

Tøkk fyri kransar, blómur og peningagávur til Frelsunarherin í Vági.
Tøkk tit øll, ið fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.
Ein tøkk til Heimaforbundið hjá Frelsunarherinum í Vági.

**Børnini v/ familjum**

## Tøkk

Hjartans tøkk fyri sýnda samkenslu og hjálp, ið varð veitt mær, tá ið góði vinur mín

**Per Jørgen Nielsen**
ættaður úr Kolding, búsitandi í Hoyvík

andaðist og varð jarðaður.

Tøkk fyri blómur, kransar og heilsanir.
Tøkk til Ingu Poulsen Dam, prest, sangarar, berarar og kirkjutænarar.
Tøkk fyri hjálp til jarðarferðina og takk til tykkum, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.
Hjartaliga tøkk øll somul.

*Familjunnar vegna*
**Arna**

### Dagurin

**25. januar. Pálsmessa.** Verður hildin til minnis um umvending Paulusar á leiðini til Damaskus í árinum 36. Á pálsmessu koma súlan og lomvigin at landi. Súludagurin er hátíðardagur í Mykinesi, og í eldri tíðum varð dansað har henda dagin. Erlendur biskupur var bispvígdur hendan dagin í 1269.